# Gravgangur eftir Englands Rose

– Eftir 20 minuttum seldi FC-búðin allar tær hundrað fløgurnar, har Elton John syngur Dianu prinsessu farvæl, teir fingu fyrradagin. Fleiri eru á veg, men allar eru seldar. Framleiðararnir megna ikki at prenta undan tær 10 milliónir fløgurnar, sum eru umbidnar í Evropa




Diana Prinsessa troystar her Elton John við jarðarferðina hjá mótaskaparanum, Versace

Singulfløgan hjá Elton John er umbiðin í 10 milliónum eintøkum í Evropa - framleiðararnir klára ikki at prenta undan...

EIRIKUR LINDENSKOV

– Vit fingu hundrað fløgur fyrradagin, og tær vórðu allar seldar eftir 20 minuttum

Hetta sigur Finn Jensen í FC-búðini í Havn, sum í gjár fekk fyrstu hundrað eintøkini av nýggju fløguni hjá Elton John við lagnum, Englands Rose, sum hann spældi til jarðarferðina hjá Dianu prinsessu

– Vit royndu í gjár at fáa fleiri eintøk í gjár men vit fáa bara 30, og tey eru langt síðani útseld

Finn Jensen sigur, at fløgan er umbiðin í 10 milliónum eintøkum í Evropa, og fløguframleiðararnir megna ikki at framleiða til eftirspurningin

I Danmark er fløgan longu seld í næstan 300 000 eintøkum Har verða fløgur heiðraðar við ávíkavist silvur-, gull- og platinplátu Selur fløgan ella plátan meira enn eitt vist, so fært tú eina dupulta platinplátu

Men singulfløgan hjá Elton John hevur longu fingið átta ferðir dupulta platinplátu - upp á einans 2-3 dagar, sigur Finn Jensen

Annars fæst fløgan í tveimum útgávum Á teirri útgávuni, sum FC-búðin fekk í gjár, eru tvey løg, Something About The Way You Lokk Tonigt og Cancle In The Wind 1997 Hendan fløgan kostar 48 krónur Á hinari útgávuni er eitt lag afturat, og kostar hon um 60 krónur, sigur Finn Jensen

– Men tað er bara lagið um Dianu, fólk vilja hava, leggur hann afturat.

Eftirspurningurin eftir hesi fløguni er óvanliga stórur

– Tað er heilt ótrúligt - eg havi ongantíð upplivað slíkt, sigur Finn Jensen – Vit hava hoyrt um, at nógvur gravgangur onkuntíð hevur verið eftir live útgávum hjá Michel Jackson og Bruce Springsteen, men eg havi ongantíð vitað um, at so stórur gravgangur hevur verið eftir eini singulfløgu, sigur hann – Hendan fløgan setur met

FC-búðin, sum einasti handilin í Føroyum, sum hevur fingið fatur á fløguni, fær fleiri fløgur í dag - men tær eru allar seldar, sigur Finn Jensen.

*Kann fáa týdning í einum møguligum sakarmáli í Haag:*

# Bretar rýma av St Kilda

JAN MULLER




Eftir at hava havt eina hernaðarstøð á oynni St Kilda vestan fyri Skotland í meira enn 40 ár hevur bretska hervaldið nú avgjørt at rýma av oynni við sínum fólki

St Kilda, sum telur triggjar oyggjar, liggur 110 fjórðingar úr skotska meginlandinum ella umleið 40 fjórðingar úr Hebridunum. Fólk búðu á oynni fram til 1930, tá tey gjørdu av at flyta inn á meginlandið. Tað var ikki hildið ráðiligt at búgva har longur orsakað av fjarstøðuni og óttanum fyri heilsustøðuni hjá fólkinum.

Tjúgu ár seinni setti bretska hervaldið fólk í land á størstu oynni og hevur hon verið brúkt sum herstøð síðani Sambært skotska blaðnum Press and Journal, er orsøkin til, at herurin fer av oynni, tær høgu flutningsútreiðslurnar

**Týdning fyri sakarmál**

Avgerðin hjá bretum at leggja St Kilda mannleysa kann fáa týdning í eini møguligari rættarsak í Haag um markið millum Føroyar og Bretland

Føroyska samráðingarnevndin hevur higartil sagt seg vilja góðtaka St. Kilda sum eitt bretskt grundlinjupunkt, tvs. at bretar kunnu brúka St. Kilda sum eitt av sínum punktum, haðani teir áseta markið

Sosialurin hevur spurt Árna Olafsson, leiðari í føroysku samráðingarnevndini, um avgerðin hjá bretum at taka fólkið av St. Kilda, fær nakrar avleiðingar fyri samráðingarnar. Hann sigur, at hetta fer neyvan at ávirka verandi samráðingar, men dylur ikki fyri, at tað kann fáa týdning í einum møguligum sakarmáli í Haag

Annars eru skotar vónsviknir av avgerðini hjá bretska herinum at fara av St. Kilda Í dag liva fýra fólk, sum eru fødd á St. Kilda. Hesi búgva í Skotlandi. Tey bera ótta fyri, at oyggin nú verður heilt gloymd av umheiminum, og tað er stórt spell siga tey við skotska blaðið

Frá
*Stokkastovuni í Runavík*

Pizzakøkurin
er opin hvønn dag

Minnist til dagsins rætt og
A la carte matseðilin!

*Stokkastovan,*
Tlf. 48850

Føroya størsta
úrval av
**PAKKITILFARI**
úr karton,
bylgjupapp og plast
innan øll vinnuøkir

Vit útvega eisini:
- Plastbakkar
- Pakkiband, tape
- Merkir, etikettir
- Knívar
- Kitlar, húgvur, handskar, svuntur o.l.
- Ymisk tól til ídnaðin
- Reingerðisevnir
- Tilsetningarevnir
- Plettar
- Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari

*... sjálvandi fyri besta prísin!*

FARPACK
P.O. Box 171,
FR-110 Tórshavn
Tlf. (+298) 14295
Telefax (+298)19107/14968